# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð

## Bygdarráðsfundur tann 20. mars 2013, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Durita á Heygum, Øssur Christiansen og John Zachariassen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Herit Magnussen boðað frá, at henni berst frá møta á fundinum, og at tiltakslimur fær fundarboð í hennara stað.

Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 19. mars 2013, og játtaði at møta á fundinum.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssur Christiansen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 16**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um broyting av ásetingunum í byggisamtyktini fyri matr. nr. 255f ella part av hesum frá frílendi til sethúsaøki.

**Viðv. 16**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 17**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um stuðul til **Bátastevnuna 2013**.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 13. mars 2013 áheitan frá Bátastevnunevndini til Vestmanna Kommunu um at rinda tríggjar rokningar á tilsamans kr. 22.310 u. mvg í staðin fyri árliga stuðulin, sum Vestmanna Kommuna plagar at lata Bátastevnuni.

Nevndin mælir til at stuðla Bátastevnuni 2013 við kr. 25.000.

**Viðv. 17**
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.45

Sign.:

Pauli T. Petersen  Karl A. Olsen  Hilbert Elisson

Malan Stórá  Durita á Heygum  Øssur Christiansen  John Zachariassen